# Álit

**í**

**løgtingsmáli nr. 105/2020: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin) og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde** (Fylgibroytingar til broytingar í grannskoðaralógini og um at seta í gildi ES PIE-fyriskipan)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 17. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Skráseting Føroya og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin (**Johan Dahl, Bjarni Hammer, Beinir Johannesen, Jákup Mikkelsen og Henrik Old) vísir á, at tað er týdningarmikið, at føroysk lóggáva á hesum øki fylgir altjóða lóggávu, so føroyskar vinnufyritøkur, parta- og smápartafeløg framhaldandi virka út frá og undir lógarverki á altjóða stigi.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen og Bjarni Kárason Petersen) vísir til viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 107/2020: Uppskot til løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin), og tekur við teimum viðmerkingunum ikki undir við málinum, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 21. apríl 2021**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Johan Dahl<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Henrik Old | Bjarni Kárason Petersen | Beinir Johannesen |
| | Jákup Mikkelsen | |